# ítróttur

Nr. 67 • mikudagur • 10. apríl 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# FM í biljard um vikuskiftið



*Sonhard Johannessen, Ólavur Kjølbro og Kristian Suni Høgnesen úr Klaksvíkar Klubba hava allir spælt seg til finaluna. Hesir tríggir vunnu eisini liðkappingina fyrr í ár*

**Fríggjadagin og leygardagin verður FM í biljard í Havnar Klubba. Átta spælarar hava leikt seg fram til finaluna. Favorittar eru Kristan Suni Høgnesen og Max Rasmussen**

BILJARD
*Stefan í Skorini*

Um vikuskiftið verður gjørt av, hvør er Føroya stinnasti biljard spælari. Tá fara átta mans at kappast í Havnar Klubba um FM-heitið.

Eftir innleiðandi umfarið hava sjey spælarar spælt seg í finaluna, meðan føroyameistarin frá í fjør fer beinleiðis í finaluna.

Meistarin frá í fjør, Max Rasmussen úr Tvøroyrar Biljardfelag, fer sostatt beinleiðis í finaluna. Hann er eisini ein av favorittunum til at endurvinna FM.

Kappingin fer at bakkastokki fríggjadagin klokkan 15 í Havnar Klubba. Tá verður spælt í tveimum bólkum við fýra spælarum í hvørjum.



*Max Rasmussen úr Tvøroyrar Biljardfelag er millum favorittarnar at endurvinna FM-heitið*

### Tveir bólkar

Í fyrra bólkinum eru Max Rasmussen úr Tvøroyrar Biljardfelag, Sonhard Johannessen úr Klaksvíkar Klubba, Ólavur Kjølbro úr Klaksvíkar Klubba og Njál R. Petersen úr Biljardfelag Fuglafjarðar.

Í seinna bólkinum eru Kristian Suni Høgnesen úr Klaksvíkar Klubba, Jan Müller úr Mimir, Bjarni Skaalum úr Havnar Klubba og Óli S. Joensen úr Tvøroyrar Biljardfelag.

Allir spæla ímóti øllum í hvørjum bólki, og tveir teir fremstu fara víðari í hálvfinalurnar, sum verða spælar leygarmorgunin.

Fyrireikararnir halda, at kappingin fer at standa millum Max Rasmussen og Kristian Suna Høgnesen, meðan Jan Müller verður mettur sum ein "outsidari", sum kann gera seg galdandi.

# Holte tapti seinnu hálvfinaluna

**Í seinastu viku spældi Holte við Bárði Mikkelsen á liðnum seinnu hálvfinaluna móti DHG Odense. Holte vann fyrr hálvfinaluna, men hesuferð var DHG stinnari. Nú skal tann triðji og avgerandi dysturin leikast**

FLOGBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Dysturin varð leiktur í KB-høllini í Keypmannahavn, og hann varð vístur beinleiðis á sjónvarpsrásini ViaSat Sport.

Holte hevði vunnið fyrru hálvfinaluna á útivølli í Odense, og tí var liðið hjá Bárði favorittur at fara beinleiðis víðari í finaluna. Men liðið úr Odense vildi tað øðrvísi.

### Holte góða byrjan

Tað var annars Holte, sum fekk eina góða byrjan og vann fyrsta settið sannførandi 25-8. Men DHG svaraði aftur og vann annað settið tepurt 25-23. Triðja settið vann Holte 25-17, men DHG kom aftur og vann fjórða settið 25-22.

Bárður heldur, at teir skuldu havt avgjørt dystin í fjórða settið, men vánaligt álopsspæl kostaði teimum sigurin. Fimta og avgerandi settið van DHG heldur sannførandi 15-8.

Nú skulu Holte og DHG spæla ein triðja og altavgerandi dyst í Aarhus. Hesin verður spældur í morgin, hósdagin.

Holte – DHG Odense 2-3 (25-8, 23-25, 25-17, 22-25, 10-15)



*Bárður Mikkelsen og Holte snávaðu á heimavølli móti DHG Odense. Tí skal triðji og seinasti dysturin gera av, hvør fer í finaluna*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



# Rógvi var óheppin



*Rógvi Johansen var óheppin í fyrstu kappingini í ár. Ein egari á hjólinum brotnaði, og hann mátti gevast*

**Rógvi Johansen var óheppin, tá ein egari í hjólinum brotnaði, og hann mátti steðga í kappingini á Odder í Jútlandi**

SÚKKLING
*Stefan í Skorini*

Kappingarárið hjá vágbinginum Rógva Johansen og hinum súkklarunum í Danmark fór av bakkastokki leygardagin. Súkklað varð á Odder í Jútlandi.

Rógvi Johansen lá væl fyri allan vegin gjøgnum kappingina, men frá byrjan av var Rógvi í høvuðsbólkinum. Hann royndi fleiri ferðir at koma leysur og fram til førandi bólkin, men hetta eydnaðist ikki í fyrsta umfari.

Nakað seinni í kappingini tóku nakrir súkklarar seg framum høvuðsbólkin, og Rógvi var millum hesar. Hetta var tá kappingin var hálvrunnin.

Men júst bólkurin við Rógva tekur seg fram í kappingini, tá hendir óhappið. Ein egari brotnaði, og hjólið bleiv skeivt. Einki var at gera hjá Rógva enn at steðga og taka seg úr kappingini.

Rógvi heldur, at hann er væl fyri, og tað er við góðum treysti, at hann fer undir eitt nýtt kappingarár í Danmark.

# Fiól- og klaver-konsert í Havn og Runavík

KONSERT
*Stefan í Skorini*

Í dag, mikudagin 10. apríl klokkan 19.30, verður konsert í Norðurlandahúsinum. Tá verður høvi at hoyra føroyska fiólleikaran Sámal Petersen og íslendska klaverleikararin Steinunn Birna Ragnarsdóttir. Hetta er fyrstu ferð, at tey bæði spæla saman.

Sámal Petersen hevur útbúgving á Tónlistaskúlanum í Odense. Seinni las hann eitt ár í Wien, og hann hevur eisini tikið lut í masterskeiðum hjá m.ø. Valerij Klimov og Christian Altenburg. Seinastu árini hevur hann starvast sum lærari á musikkskúlanum, og eisini hevur hann verið konsertmeistari í Føroya Symfoniorkestri, harumframt var hann við til at stovna tónleikabólkarnir Aldubáruna og Musica Viva.

Steinunn Birna Ragnarsdóttir tók einleikaraprógv í Tónlistaskúlanum í Reykjavík í 1981, tók seinni masterútbúgving á New England Conservatory í Boston. Han starvaðist í Spania í eina tíð sum sololeikar og hevur annars spælt ymsastaðni í Evropa, og hon hevur fingið virðislønir fyri sítt spæl. Steinunn starvast á Tónlistaskúlanum í Reykjavík.

Fyrra konsertin verður í Norðurlandahúsinum mikudagin klokkan 19.30. Seinna konsertin verður í býráðshøllini í Runavík hósdagin 11. apríl klokkan 19.30

Á skránni eru verk eftir Beethoven, Wieniawski og Franck. Atgongumerki fáast við dyrnar.

# Hvar er bólturin?




tað er ikki loyvt at kopiera henda lepa

**Gitið, hvar bólturin er, og vinnið eina ferð til stórdystin millum FCK og Brøndby**

12. mai í ár verður stórdystur í Danmark. FCK tekur tá ímóti Brøndby, og longu nú er líkt til, at hetta verður dysturin, sum ger av, hvar DM-gullið skal fara í ár.

Sum kunnugt skipa Atlantic Airways og Sosialurin fyri ferð til Keypmannahavnar í samband við dystin, og nú ber til hjá onkrum hepnum lesara at vinna sær pláss á hesi ferð.

Tað ræður snøgt sagt um at gita, hvar bólturin eigur at vera á myndini. Skrivað á lepan, í hvørjum teigi tú heldur bólturin eigur at vera, og send síðani lepan til okkara. Allir lepar við rætta svarinum verða latnir í ein pott, og hin 27. apríl fara vit at kunngera, hvør hepni vinnarin er. Um so er, at hesin longu hevur keypt sær ferðaseðil til dystin, ber sjálvandi til at fáa hendan endurgoldnan. Kappingin verður í blaðnum til og við 23. apríl. Minnist til. Jú fleiri lepar tit senda inn, størri er møguleikin fyri at gerast hepni vinnarin.

**Navn:** ____________________

**Bústaður:** ____________________

**Tlf:** ____________________

**Eg giti, at bólturin er í teigi:** ____________________

**Seðilin skal sendast til:**
**Sosialurin, postsmoga 76, 110 Tórshavn.**
**Merkið brævbjálvan "FCK"**

Sosialurin
ATLANTIC AIRWAYS

4